# VIKUSKIFTI

SAMBAND
JAN MÜLLER
JAN@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Ongan at spæla við

– Tað er keðiligt ikki at hava nakran annan at spæla við í fríkorterinum, sigur einasti næmingurin í Funnings skúla, Henny Juul Johannesen.



*Umframt undirvísingina ger lærarin Alis Jacobsen eitt stórt arbeiði fyri at Henny knýtir vinabond við aðrar næmingar á smærri bygdaskúlum kring landið*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

SKÚLI
*Snorri Brend*

**ÓSATT:** Tað er mikudagur og fríkorter í Funnings skúla. Uttanfyri hoyrist róp og skrál frá einum hópi av næmingum sum fegnast um at kunna røra seg eitt sindur í góðveðrinum.

**SATT:** Tað er mikudagur og fríkorter í Funnings skúla. Uttanfyri hoyrist hvørki róp ella skrál frá næmingum. Tvørturímóti. Her valdar kvirran.

Inni í teldustovuni situr nevniliga einasti næmingurin í skúlanum og spælir við telduna.

Jú, 11 ára gamla Henny Juul Johannesen hevur fríkorter, men hon hevur ongan at spæla við. Hon er í roynd einasti næmingurin í skúlanum.

- Tað er bæði gott og ringt, at tað bara eri eg í skúlanum, sigur Henny sum gongur í 5. flokki.

Tá vit vitjaðu skúlan mikudagin vóru føroyskar plantur ovast á breddanum í undirvísingini.

Hetta var eitt úrslit av ferðini, sum Henny og næmingar úr øðrum smærri bygdarskúlum høvdu í Skúgvi í farnu viku.

Planturnar funnu næmingarnir ymsastaðni á oynni. Fyrst skulu tær límast á eitt ark, síðani skal navn teirra setast á og at enda skulu tær setast inn í eina mappu.

- Annars dámar mær best handarbeiði, sigur Henny.

## Smærru skúlarnir

Henny nýttist ikki at vera einasti næmingurin í skúlanum. Í roynd og veru eru tveir aðrir næmingar í skúlaaldri, men teir ganga í skúla aðrastaðni.

- Tað góða við at vera einasti næmingur er, at ein lærir meiri. Men tað er keðiligt ikki at hava nakran annan at spæla við í fríkorterinum, sigur Henny.

Lærari hennara, Alis Jacobsen ger alt fyri at hon ikki skal kenna seg so eina.

Samstarv hevur tí verið skúlarnar í Funningsfirði og Gjógv, har næmingarnir hava fimleik saman hvønn týsdag í Stranda skúla. Seinni um dagin koyra tær báðar til Funningsfjarðar skúla, har tær eru saman við næmingunum har til ymiskar lærugreinar, m.a. náttúru og tøkni, matgerð tilevning og annað.

Týsdagin í hesi vikuni var ein partur av undirvísingini uttandura, tá tey fóru á seiðaberg í Funningsfirði. Sjálv fekk Henny nakrar seiðir.

- Tað var ikki akkurát so stuttligt henda dagin, tí veðrið var ikki so gott. Eg bleiv eitt sindur køld, sigur Henny.



*- Tað góða við at vera einasti næmingur er, at ein lærir meiri, sigur Henny Juul Johannesen. Aftanfyri sæst Funnings skúli*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Fótbóltur

Í skúlagarðinum liggur – ikki óvæntað – ein bóltur. Men hann verður mest brúktur eftir skúlatíð, tá funningsbørn hittast til dyst.

Fótbóltur stendur rættiliga ovarlaga á skránni hjá børnunum í bygdini. Hetta er ikki minst orsakað av góðu úrslitunum hjá EB/Streymi í Formula-deildini.

Sjálv spælir Henny við gentum 10-12 ár hjá EB/Streymi, og venja tær regluliga á vøllinum á Eiði.

Annars spælir Henny ofta við bestu vinkonu sína Elsa Mariu, sum er eitt ár eldri enn hon.

- Hon dámar eisini væl at sparka bólt, sigur Henny.



Petur Skeel Jacobsen um vikuskiftisveðrið:

# Sól og turt

VEÐUR
*Snorri Brend*

- Um vikuskiftið verður gott veður, sigur veðurmaðurin, Petur Skeel Jacobsen. Tað verður eitt lítið lot, fyri tað mesta av landnyrðingi og eystri, og viðførir hetta tað góða veðrið alt vikuskiftið.

Bæði leygardagin og sunnudagin verður turt og sól, men kortini er møguleiki fyri mjørkaflókum.

Hitin báðar dagarnar verður millum 13 og 16 stig, og um 10 stig um náttina.

Í seinastuni hava vit hoyrt um tvær ódnir, sum hava herjað ymsastaðni. Spurningurin hevur verið, um tær mundu fara at koma hendavegin.

- Nei, sigur Petur Skeel.

Ódnin Gordon kemur ikki hendaveg, tí hon fór framvið Írlandi munandi viknað.

Ein onnur ódn Helena er stødd hundraðtals fjórðingar í ein landssyning úr Cape Race í New Foundlandi, og fer í ein landnyrðing eystan.



*- Turrveður alt vikuskiftið, sigur veðurmaðurin, Petur Skeel*